## Kuba ikki kapitalistiskt

Kubanski forsetin, Raul Castro, ávaraði í gjár USA og ES um, at ongar ætlanir eru um at broyta landsins politisku skipan, og at hann ætlar sær ikki at endurreisa kapitalismuna í Kuba. Í einari røðu, sum forsetin helt í sambandi við, at tjóðartingið endaði setuna, segði forsetin, at hann er til reiðar at tosa um øll viðurskifti burtursæð frá teimum politisku og sosialu skipanunum í landinum. Tann 78 ára gamli forsetin segði seg vera sinnaðan til at taka lut í einum orðaskifti við USA á javnbjóðis føti. Men ikki um landsins politisku skipan, legði hann afturat.



## Arbeiðsleys arbeiða

Í einari roynd av tálma arbeiðsloysinum millum unfólk hevur bretska stjórnin gjørt av at geva arbeiðsleysum lesandi møguleika at gera vælgerðararbeiði uttan fyri landoddarnar. Skipanin er komin í lag í samstarvi við samtakið Raleigh International, og hon gevur teimum arbeiðsleysu høvi til at arbeiða í eitt nú India ella Costa Rica sum sjálvboðin. Sambært blaðnum Times skulu tey lesandi rinda ein part av kostnaðinum sjálv, og megna tey ikki at rinda alt, fáa tey tað írestandi frá tí almenna. Stjórnin í London sigur, at skipanin er mennandi fyri tey ungu.

# Allir línubátarnir í Klaksvík liggja

**Í morgun landa teir trolaran Haki í Klaksvík. Skipið hevur 350 tons av frystum, sum teir hava fiskað í Grønlandi**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fyrstu tveir dagarnar í hesi vikuni verður neyvan nøkur ísfiskalanding í Klaksvík, men mikudagin er væntandi, at trolararnir Safir og Smaragd koma inn at landa.

Á Landingarmiðstøðini í Klaksvík verður sagt, at Safir og Smaragd hava gjørt nakrar túrar, síðan teir fóru til fiskiskap aftur fyrr í ár, og sum skilst hevur veiðan verið brúkilig, sum tikið verður til.

Í morgun landa teir trolaran Haki, sum JFK rekur. Skipið fiskar í Grønlandi og veiðan, sum skipið leggur upp í Klaksvík í dag, er um 350 tons av frystum fiski, meginparturin svartkalvi og toskur.

Fiskurin verður í fyrsta lagi koyrdur norður á frystigoymsluna í Ánunum.

Úr Klaksvík siga teir annars frá smáligum útróðri, og seinastu tíðina hevur allur línuflotin ligið við bryggju, tí tað er ikki lønandi at loysa skipini við verandi fiskiskapi og fiskaprísum.

- Væntandi loysir línuflotin ikki aftur fyrr enn seinni í august, siga tey á Landingarmiðstøðini.

*Teir hava nú gjørt tríggjar túrar undir hattinum hjá Faroe Seafood, og í morgun landa Nónhamar og Fjalshamar sløk 200.000 pund í Saltangará*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



# Nónhamar og Fjalshamar fiska fyri Faroe Seafood

**Hetta er triði túrurin hjá ísfiskatrolarunum Nónhamri og Fjalshamri, nú Faroe Seafood ger skipini út fyri klaksvíkingar**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nú seks skip eru á gulllaksaveiði alt summarhálvárið, og færri skip soleiðis eru at veiða upsa til føroysku fiskavirkini, hevur Faroe Seafood, sum bæði rekur virkir og skip, gjørt sáttmála við Kristian Martin Rasmussen í Klaksvík um leigu av ísfiskatrolarunum, Nónhamri og Fjalshamri.

Eftir at teir seks ísfiskatrolararnir, sum vóru undir hattinum hjá Maru Seafood í Klaksvík, fóru á tvingsilssølu og vórðu keyptir av Føroya Banka, keyptu suðuroyingar tvey av skipunum, Navaran og Borgaran, aftur frá bankanum, meðan Kristian Martin Rasmussen og synir hansara keyptu teir fýra, ið eftir vóru, Safir, Smaragd og Fjalshamar og Nónhamar.

### Tríggjar túrar

Tað er ein tíð síðan, at Safir og Smaragd loystu, og nú hava teir báðir trolararnir, ið eftir vóru, eisini verið tríggjar túrar undir hattinum hjá Faroe Seafood.

Skipini landa á landingarmiðstøðini hjá Kongshavn í morgun, og veiðan er tilsamans sløk 200.000 pund, at kalla alt er upsi.

Tilsamans eiga teir fýra ísfiskatrolararnir, sum Kristian Martin Rasmussen og hansara synir eiga, stívliga 400 fiskidagar um árið, men við tað, at skipini hava mist so nógva fiskitíð í verandi fiskiári, hava tey átt dagar eftir.

*Hesin steinurin, sum datt niður úr beninum og niður á parkeringsøkið hjá Brotinum eina náttina herfyri, vigar helst meira enn 200 pund*



# Stelkur og Bakur við nógvum upsa

**Á landingarmiðstøðini Kongshavn í Saltangará hava tey í morgun bæði landað upsa og gulllaks**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Millum skipini, sum landa á landingarmiðstøðini hjá Kongshavn í Saltangará í morgun, eru ísfiskatrolararnir, Stelkur og Bakur, sum hava stívliga 400.000 pund tilsamans, meginparturin upsi.

Gulllaksaskipini, Eysturbúgvin og Vesturbúgvin, landa eisini í morgun. Fyrrnevndi leggur veiðina upp í Saltangará, og hin landar á Toftum.

Eysturbúgvin og Vesturbúgvin hava stívliga 400.000 pund av gulllaksi tilsamans.

Fríggjadagin landaðu Polarhav og Stjørnan umleið 480.000 pund av gulllaksi í Saltangará.

Á landingarmiðstøðini siga tey, at landaðu nøgdirnar higartil í ár eru omanfyri 25.000 tons tilsamans, og hetta er nógv meira enn somu tíð undanfarna ár.